Umhvørvismálaráðið

Att: Margit Stórá, landstýriskvinna

Tórshavn, 20. oktobur 2025

Hoyringssvar frá Effo til "Uppskot til Løgtingslóg um veðurlagslóg"

Effo ynskir, og arbeiðir miðvíst fyri, at vera ein viðspælari í grøna orkuskiftinum í Føroyum, og loyvir sær tí at koma við fylgjandi viðmerkingum til uppskotið um veðurlagslóg.

Yvirskipaðar viðmerkingar

Uppskotið er áhugavert, stórætla og er tað at gleðast yvir.

Tó metir Effo at uppskotið:

- Spennir um eitt ov stutt tíðarskeið til málið skal røkkast
- Ikki í nóg stóran mun viðgerð kostnaðin av at røkka málinum
- Leggur ov stórar fíggjarliga byrðar á verandi brúkarar, og harvið verri kappingarføri
- Elvir til at íløgur verða útsettar ella steðga, tí alternativ grøn loysn ikki finnst.

Lógaruppskotið er sera yvirskipa og hevur eitt greitt mál, ið er at útlátið frá olju er netto 0 í 2050. Væntast kann, at fleiri kunngerðir og/ella fylgilógir skulu gerast fyri at náa hesum máli. Meðan alheimsfylgjurnar eru stórar um vatnstøðan í havinum veksur, so eru fylgjurnar av hesum uppskotinum eisini stórar fyri samfelagið og vinnulívið í Føroyum.

Búskaparligt skynsemi

Uppskotið leggur upp til, at alt virksemi í Føroyum, á landi og sjógvi, sum í dag brúkar fossilt brennievni, skal innan 2050 hava skift til aðra orkukeldu.


Um hugt verður eftir býtinum av orkunýtsluni í Føroyum, so verður helmingurin brúktur á landi og hin helvtin á sjógvi.

Orkuskifti á landi

Orkuskifti á landi er komið væl longri, enn tað á sjógvi, og er eisini einklari at fremja. Tó skulu stór tøk takast og stórar íløgur gerast næstu árini, um orkuskifti á landi skal vera framt innan 2050.

Upphiting til bygningar og hús

Tað eru áleið 18 ár síðani at privata húsarhaldið byrjaði at skifta oljufýr út við hitapumpuloysnir. Í dag kann staðfestast, at hóast stuðulsskipanir hava verið í fleiri ár, eru tað 5-6.000 húsarhald, ið hava skift til eina grøna orkuloysn. Síðstu árini eru umleið 1.000 hitapumpuskipanir settar upp um árið, og nú stuðulsskipanir verða niðurlagaðar, sær tað út til, at skiftið hevur lagt seg í eina fasta legu.



Enn eru umleið 15.000 hús og bygningar, ið brúka olju til upphiting. Um gongdin í orkuskiftinum, innan hetta øki, heldur fram, hava øll hús og bygningar eina grøna orkuloysn í 2040.


Akfør

Menningin av elbilum hevur verið støðug seinastu árini og alsamt fleiri elbilar síggjast á føroysku vegunum. Sølan av elbilum hevur í stóran mun verið eggja av almennu stuðulsskipanini. Men nú stuðulsskipanin til elbilar støðugt er niðurlaga, minkar áhugin fyri elbilum og bilasølur siga, at eftirspurningurin eftir elbilum er fallandi.

Eisini hava bilframleiðarar, ið høvdu fráboðað, at einans elbilar fóru at verða framleiddir innan eitt stutt áramál, broytt ætlan og útsett málið um at steðga framleiðsluna av bensin og diesel bilum.

Í dag eru beint undir 10% av persónbilunum í Føroyum elbilar, meðan samlaða talið av eldrivnum akførum í Føroyum er 6,8%.

Um hugt verður eftir keypskostnaðinum av einum eldrivnum akfari, samanborið við eitt líknandi akfar, ið brúkar olju sum brennievni, so er kostnaðurin fyri ein persónbil 25-40% hægri og fyri tungu akførini 200-300% hægri.



Livitíðin á akførum er um 15-20 ár, so væntast kann at flestu akfør, ið eru skrásett í Føroyum í dag, eru skift út innan 2050. Tískil kann eitt náttúrligt skifti fara fram í Føroyum næstu 25 árini, har akførini skifta frá fossilum brennievni til aðra orkukeldu.

Íløga í upphiting og akfør

Íløgan at skifta upphitingarkeldu til bygningar og hús, er mett at vera umleið 3 mia. kr.

Sambært hagtølum frá Akstovuni vóru tað skrásett 42.578 akfør í oktobur 2025, harav vóru umleið 97% persónbilar ella minni akfør og 3% vóru tung akfør.

Mett er, at nýíløgan í akførum er um 10 mia. kr.

Um støðið verður tikið í, at eldrivin akfør eru ávikavist 40% og 200% dýrari enn vanlig- og tung akfør, ið eru oljudrivin, so vil meiríløgan vera 5 mia. kr.

Samlað skal ein íløga komandi 25 árini gerast í útskifting av upphitingarkeldu og akførum á umleið 18 mia. kr. Tá er íløgan í net, tryggan mátt, elløði-infrakervi ella orkuframleiðslu ikki tikið við.

Íløga í net og framleiðslu

Sambært yvirlitinum frá Umhvørvistovuni av orkurenslinum fyri 2024, vísti at umleið 2.000 GWt av orku vóru brúktir á landi í 2024.

Í 2024 seldi Sev umleið 480 GWt av streymi til føroyska samfelagið. Um støði verður tikið í, at øll orkunýtsla á landi skal koma frá streymi framleiddur í Føroyum, vil tað viðføra at elframleiðslan skal fýra faldast, samanborið við 2024.

Miðallastin á almenna elnetinum er umleið 50 MW, meðan spísslastin nærkast 70 MW. Um orkutørvurin fer at fýra faldast, kann væntast at lastin á netinum fer at fylgja hesum vøkstri og lastin verður um tríggjar til fýra ferðir tað, lastin er í dag.

Um orkan skal framleiðast við vindi, vil tað viðføra eina munandi útbygging av vindorku. Seinnu árini er umleið 2/3 av møguligu vindorkuni gagnnýtt til elframleiðslu. Við støði í gagnnýtsluni av vindorkuframleiðsluni, er íløgukostnaðurin í vindframleiðslu umleið 3 mió. kr./GWt, tvs. at íløgan í vindframleiðslu komandi 25 árini er 4,5 mia. kr.

Fyri at framleiða 1.500 GWt av streymi úr vindi skal áleið 570 MW av vindorku setast upp.

Fyri at fáa orkuna til høldar, er neyðugt eisini at útbyggja og styrkja elnetið, umframt er útbygging av tryggum mátti eisini neyðugt. Kostnaðurin fyri hetta er áleið tað sama, sum fyri at útbyggja framleiðslukapasitetin úr vindi.

Sostatt er neyðuga íløgan í framleiðslu og net, fyri at øll orkan á landi skal koma frá el, umleið 9 mia. kr.

Orkuskifti á sjógvi

Orkuskifti á sjógvi er í nógv meiri avbjóðandi at loysa, enn orkuskifti á landi. Orkuskifti á sjógvi, fer harumframt, at vera munandi meiri umfatandi og íløgukrevjandi enn tað á landi.

Tøkniliga menningin av loysnum til skip, er als ikki komin líka langt sum á landi. Regluverk og trygdaratlit eru heldur ikki ment í nóg stóran mun.

Í meðan tað í størri mun er greitt, at hitapumpur og battarí fara at vera grundarlagið undir orkuskiftinum á landi, so er tað meiri ivasamt, hvat kemur ístaðin fyri fossilu-drivnu motorarnar á sjónum.

Um hugt verður eftir skipum og bátum, sum eru skrásett í føroysku skipaskrásetingini FAS, sæst at tað eru 3.336 skip og bátar skrásett. Miðalaldurin er 41,6 ár.

Við støði í hesum hagtølum, sæst at eitt natúrligt skifti av flotanum ikki verður framt innan 2050. Við tøknini, sum er tøk í dag, er tað heldur ikki sannlíkt at skip og bátar, ið verða bygd í dag, verða drivin av einum grønum orkuverki. Tískil vil lógaruppskotið viðføra eina stóra eykaútreiðslu fyri skipaflotan, har neyðugt verður at selja aktiv, ikki tí tey ikki eru brúkilig, men tí tey ikki brúka rætta brennievni. Hetta kann í ringasta føri eisini viðføra, at prísurin fyri aktivini verður lægri enn vanligur marknaðarprísur, tí keypari veit, at seljari má sleppa sær av við aktivini.

Bólkur - undirbólkur	Miðalaldur (ár)	Antal (stk.)
F - Bátar	43,2	2777
FS - Fiskiskip	40,1	265
FS - Handilsskip	24,5	176
FS - Stuttleikaskip	55,2	42
FAS	21,7	76
Samlað	41,6	3336

Tað verður arbeitt við at menna alternativ grøn brennievni, so sum amonniak, methanol, bio-olju og syntetiska-olju, samstundis sum atom eisini verður nevnt sum eitt alternativ.

Tað eru sera stórar íløgur, sum skulu gerast innan menning av hesum øki, næstu árini. Tá tað er vorðið greiðari, hvat brennievni kemur ístaðin fyri fossilu oljuna, ið verður brúkt í dag, kann væntast at tað fer at ganga skjótt at fremja eitt orkuskifti. Tað er tó sera ósannlíkt at tað verður innan næstu 25 árini, at hetta skiftið er framt.

Tað eru altjóða felagsskapir, so sum IMO, ið seta mál og markvirðið fyri skipaflotan. Tað vera í størsta mun slíkir felagsskapir, ið fara at dríva orkuskifti á sjógnum og seta mál um útlát og nær hesi skulu vera nádd.

Tískil er tað skilabetri at hugsavna seg um orkuskifti á landi og avmarkað lógarverkið til at fevna um mál, um útlát, ið er frá landi.

Samanumtøka

Aktørar í orkuskiftinum

Við hesi lógini og málsetningum verður orkuskifti eitt tað størsta íløguøki komandi 25 árini.

Fyri at hetta skal blíva ein veruleiki, so mugu vit fáa eina smidliga skipan, har allar góðar kreftir sleppa framat, eisini tað privata vinnulívið. Tað er neyðugt at vinnulívið framhaldandi kann vera

kappingarført við útheimin og fyri at tað skal vera møguligt, er neyðugt at smidligar skipanir og alternativar orkuverkætlanir verða loyvdar.

At enda

Samanumtikið verður mett at tíðarskeiðið er sera stutt til at náa málinum í uppskotinum. Tó verður tað mett møguligt at røkka einum orkuskifti á landi innan 2050.

Hetta fer tó at krevja eitt miðvíst arbeiði, har myndugleikar, orkuframleiðarar, orkuavtakarar, íleggjarar og aðrir áhugapartar arbeiða í felag fram ímóti at røkka hesum máli. Eisini skal stórt lendi avsetast, umframt at nógvar forkanningar skulu fremjast í mun til náttúru- og veðurviðurskifti.

Á sjógvi eru ongar haldgóðar loysnir enn til orkuskifti. Hvørki tøkniligar loysnir, lógarverk ella infrakervið er ment til, at tað er realistiskt at náa einum orkuskifti á sjógvi í 2050. Ístaðin verður mælt til, at orkuskifti á sjógvi fylgir altjóða ásetingum frá stovnum sum IMO og líknandi.

Stórar útbyggingar skulu fremjast innan orkuframleiðslu, net og stabilisering av netinum, umframt at tryggi mátturin skal útbyggjast.

Eisini sera stórar íløgur skulu gerast av orkubrúkarum/-móttakarum at umleggja til grøna orku. Hetta leggur stórar fíggjarligar byrðar á brúkarar og kann viðføra verri kappingarføri hjá vinnulívinum.

Við verandi lógaruppskoti kann væntast, at vinnulívið fer at útseta ella steðga ætlaðum íløgum, annaðhvørt tí at tíðarkarmurin fyri avskrivingini av íløguni verður ov stuttur í mun til tann ótryggleika hendan lógin viðførir, kappingarføri við eini grønari loysn ikki er nóg gott, ella tí at alternativar grønar loysnir ikki finnast ella eru nógv væl útbygdar.

At enda verður mælt til at avmarkað lógaruppskotið til at fevna um orkuskifti á landi. Harumframt verður mælt til, at vinnan útnevnur ein serfrøðing, ið verður partur av veðurlagsráðnum.

Vinarliga

P/F Effo